**Tórhallur á Oyrabakka:**

# Sjey brøður gjørdust sjómenn

**Vit fara nú undur eini røð við frásøgnum hjá Tórhall Andreassen. Hann er ættaður av Norðskála, og tey vóru ikki færri enn 14 systkin. Átta teirra vóru dreingir. Ein doyði ungur, meðan hinir gjørdust fiskimenn, skiparar og motorpassarar. Henda røðan fer at spenna vítt. Fyrst verður greitt frá abbanum, Andrass í Pállstovu á Eiði. Síðan verður greitt frá lívinum í Sundalagnum og ikki minst frá sildaveiðuni, sum var eitt týðandi grundarlag fyri tilveruni har. Greitt verður frá sjólívinum hjá Tórhalli og eisini hjá hinum beiggjunum, eins og vit fara at greiða frá, hvussu tað hevur gingist hjá hesum systkjunum, har ein systir er farin so langt sum til New Zealand**



Tórhallur Andreassen og hansara ætt hava verið úrmælingar á sjónum



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

## Sigga og Andrass í Pállstovu vóru úrmælingar

Fyrst skal verða greitt frá abba og ommu Tórhall, Siggu og Andrass í Pállstovu á Eiði. Íblásturin til, at hetta verður gjørt, kemur frá tí 100 ára gamla Andrias í Tarti úr Oyndarfirði, sum er væl kendur av lesarunum hjá FF-blaðnum og Sosialinum. Andrias helt um dagarnar, at tað var merkiligt, at ikki meira var skrivað um Andrass, so ófrúr maður, sum hann hevur verið. Vit hava tikið Andrias uppá orðið, og vilja lýsa Andrass so væl, sum tað ber til í dag. Vit kunnu eisini staðfesta, at Andrias hevur so púra rætt, Andrass er verdur at skriva um. Samstundis kunnu vit geva eitt íkast til søguna um føroyskan útróður "til lands" í Íslandi.

Keldurnar til hendan partin av frásøgnini er umfram Tórhall sjálvan eisini tveir aðrir abbasynir hjá Andrass. Annar er Tummas Andreassen, ættaður av Eiði, sum er sonur Emil hjá Andrass. Hin er Johan Petersen, ættaður úr Hattarvík, sonur Miu hjá Andrass. Vit hava eisini íkøst frá Símun Johan Wolles og Poul Andreassen.

Andrass í Pálsstovu var ættaður av Eiði, føddur 3. februar 1858. Foreldur hansara vóru Heindrikkur Andreasen av Eiði, f. 1835, og Anna Katrina Christiansdatter, eisini av Eiði, f. 1839. Foreldur Annu Katrinu vóru: Rakul Hansdatter, eitt av teimum 16 systkjunum úr Dúvugørðum, men uppvaksin á Látrinum á Eiði, og Christian Johannes Joensen á Mýruni á Eiði. Hesin Christian Johannes á Mýruni (abbi Andrass í Pálsstovu) var ein av eigarunum á jaktini "Neptunus", (Eiðisjaktin nevnd) eitt lítið skip, sum hann saman við Hans Jacob Joensen á Eiði keypti í Keypmannahavn í 1847. Teir settu 32 gyllin í jørð í veð fyri einum láni at keypa skipið fyri, men treytirnar vóru harðar: lánið skuldi gjaldast aftur eftir tveimum árum. Harafturat bundu teir seg fyri nógvar pengar í sáttmála við ein danskan skipara. Fiskin, teir fingu vórðu teir noyddir at avvreiða til kongaliga handilin fyri vánaligan prís. Í 1852 varð skipið selt (Páll Nolsøe hevur skrivað um eiðisjaktina í siglingarsøguni).

Andrass í Pálsstovu átti hesi systkin: Rakul (1860 – 1876), Christian Johannes (1863 – 1882), Jóan Pauli (1865 – 1937), Jógvan (1868 – doyði sum ungur á kommunusjúkrahúsinum í Grimsby), Súsanna Malena (Sanna), (1871 -), búði í Havn, Hans Jacob (1873 – 1953), giftur á Argjum, Rakul (1877 - ) búði í Havn, og Hans Michael (1879 – 1961).

Jóan Pauli og Hans Michael búsettist báðir í Vági. Sum ungir róðu teir út (vóru til lands) saman við brøðrum sínum í Íslandi. Seinni sigldu teir við trolarum í Grimsby, har nógvir føroyingar vóru hesi árini. Tá ið trolarin Royndin kom til Vágs í 1922 vóru teir báðir við, Hans Michael sum 1. stýrimaður øll árini, til trolarin varð seldur av landinum í 1930. Tá ið trolarin Beinisvørð kom til Vágs eftir kríggið, var Hans Michael ikki við, men hann stóð fyri trolarbeiðinum á landi, og lærdi teir ungu at bøta trol og annars arbeiða við troli.

Hans Michael var trý ára gamal, tá ið bróðirin Christian Johannes gekk burtur við báti av Cathrinu undir Íslandi. Cahtrina var lítið skip, langbumari, sum kendi handilsmaðurin í Miðvági, Godtfred Heinesen átti. Teir róðu út við bátum, og skipari var Ditlev Houmann, sum seinni gekk burtur við sluppini Hermod. Teir lógu á Reyðafirði, hetta var 5. september 1882, og annar av bátunum, sum vóru til útróðrar, kom ikki aftur. Við vóru 4 mans, og ein av teimum var Christian Johannes. Hans Michael segði seg minnast, tá ið Christian Johannes fór avstað, hann gekk í grulvugarði, og græt illa, tá ið bróðirin fór, tí hann var so góður við hann. Christian Johannes royndi at ugga hann, og segði,



Andrass og Sigga í Pállstovu. Eiga sín part av útróðrarsøguni til lands í Íslandi. Andrass var føddur í 1858, og tey doy›u bæ›i umlei› 1935-36